# Valentindagurin vindur upp á seg í Føroyum

**Dagurin í morgin eitur dagurin »Valentinus«. Tað er dagurin tey flestu av okkum kenna frá amerikanskum filmum, har vit senda kort og geva gávur til okkara kæru. Henda siðvenja hevur fingið fótafesti í Norðurlondum og er nú eisini á veg til okkum í Føroyum**



**FAKTA**

**Mátar at feira Valentindagin og gleða mannin/konuna:**
- Keyp eina rósu
- Send eitt kort
- Bjóða henni/honum ein góðan matabita - antin heima ella úti
- Keyp eitt sjokulátahjarta
- Keyp eina bamsu sum sigur »Eg elski teg«
- Send eitt kerligt sms ella e-bræv

SIÐVENJA
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

– Tað vindur meiri og meiri upp á seg at feira Valentindagin. Tað sigur Nomi á Hvítanesi, sum arbeiður í blómuhandlinum Orkis á Glyvrum.

Tey selja nógvar rósur bæði sum bukettir, í posa og í fløskum.

Tað eru mest ungir menn sum koma inn at keypa, og alt sum er reytt er rætt, sigur Nomi.

Á Hotel Hafnia hava tey eina serliga Valentinmeny.

– Vit hava eina tríggja-rætta matskrá sum er serliga lekkur. Desertin er ein masarinkaka við berum, nougatine og vaniljmousse, siga tey úr køkinum á Hafnia.

Tey hava havt eina Valentinmeny í trý ár, og undurtøkan er góð.

– Millum 50-80 fólk plaga at koma, tey flesu sum pør, sigur Petur Hentze á Hotel Hafnia.

Borðini eru dekkaði við reyðum rósum.

## Vígdi í loyndum

Søgurnar aftan fyri Valentinusdagin eru fleiri, men ein tann kendasta er, at tað var ein djarvur italienskur prestur, sum æt Valentius, sum vígdi forelskað pør í loyndum, eftirsum kaisari Claudius II hevði forboðið giftarmál millum ung fólk.

Valentius bleiv uppdagaður og koyrdist í fongsul, og bleiv seinni hálshøgdur. Áðrenn hann doyði fekk hann tokka til dóttur fongavørðin og skrivaði henni eitt kærleiksbræv, sum han undirskrivaði við »Tín Valentin«.

Hann skal eisini hava sagt hetta, áðrenn hann doyði: »Tit skulu ikki syrgja meg, men gleði tykkum, at tit eru maður og kona, tí kærleikin er ein dýrabarur skattur, dýrabarari enn sjálvt lívið«.

Alt hetta hendi í Rom ár 269 e. Kr.

Siðvenjan við at feira Valentin byrjaði í Englandi og Frankaríki longu í 1300-talinum. Gávur og kærleiksbrøv hoyrdu til mátarnar at vísa sín kærleika.

Í 1900-talinum gjørdist tað eisini stórt í USA, og tað er tann vegin, siðvenjan er komin til Norðurlond.

So tey sum pástanda, at Valentinedagurin er enn ein ávirkan úr USA, fara skeiv hetta er ein evropeisk siðvenja, sum amerikanarar hava tikið til sín, og sum nú er á veg til okkara umvegis USA.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 7 2006

# Tekningar lítla ávirkan

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var friðarlig á fíggjarmarknaðunum. Ongar serliga álvarsamar fíggjarligar kunngerðir vóru á skránni, og broytingarnar á ymsu marknaðunum vóru smáar. Nógv verður práteð um ávirkanina á danska búskapin av Muhammed-tekningunum. Danski partabrævamarknaðurin lækkaði 3% í farnu viku, men hetta er neyvan orsakað av tekningunum. Lundbeck lækkaði 11%, og A. P. Møller-Maersk lækkaði 8%. A. P. Møller-Maersk fyllir umleið triðingin av danska partabrævavísitalinum, so hetta gjørdi munin. Harumframt lækkaði Danske Bank eisini 2%, hóast roknskapur teirra var sera góður. Novo Nordisk, sum selur nógv í Miðeystri, hækkaði harafturímóti eitt vet. Danski útflutningurin til tey londini, ið boykotta í løtuni, er einans 1% av samlaða danska búskapinum, og hetta er orsøkin til, at partabrævamarknaðurin tekur hurlivasan róliga.

## Lánsbrøv støðug

Lánsbrøvini komu í farnu viku í eina støðuga legu, eftir at renturnar hækkaðu í seinnu helvt av januar. Útlit eru nú fyri, at renturnar kunnu lækka eitt sindur, men enn eru eingi tekin um, at 10-ára rentan skal niður á 3% í bræði.

## Higartil góðir roknskapir

Roknskapirnir fyri 4. ársfjórðing, ið higartil eru kunngjørdir, hava sum heild verið góðir, bæði í Norðurlondum, Evropa og USA. Av teimum 500 virkjunum í breiða amerikanska vísitalinum, S&P 500, hava 79% nú kunngjørt. Kunngerðirnar vísa, at inntøkurnar eru hækkaðar útvið 14% í mun til fyri ári síðan, og at 80% av einstøku virkjunum hava kunngjørt tøl ájavnt ella betur enn tað, ið greinarar hava mett. Sostatt hava roknskapartíðindini verið góð, og verið stimbrandi fyri gongdina á partabrævamarknaðunum. Vit meta at hendan gongdin fer at halda áfram. Gongdin stuðlar eisini undir okkara bjartskygni viðvíkjandi partabrøvum.

## Hesa vikuna

Hesa vikuna verða kunngjørd álitistøl bæði í Evropa og USA, umframt tøl fyri prísvøksturin í USA. Áhugaverdir roknskapir hesa virkuna eru teir frá Dell, Hewlett-Packard og Electrolux.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 627,18 | 1,0% |
| JPY | 5,32 | 1,9% |
| GBP | 1.094,11 | 0,0% |
| NOK | 92,38 | -0,6% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 102,70 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 171,95 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 111,89 | -0,4% |
| Altjóða Vøkstur | 74,51 | 0,0% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*